# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Klarinettir í Havnar Kirkju og Miðlahúsinum

Matiné verður í Havnar Kirkju leygardagin 8. desember við Føroya Klarinettorkestri og Klarinett jól verða í Miðlahúsinum í Vagsbotni leygardagin 15. desember

Matiné verður í Havnar Kirkju leygardagin 8. desember 2007 kl. 11.30 við Føroya Klarinettorkestri.

Føroya Klarinettorkestur er vorðin ein fastur táttur í føroyskum tónleiki. Orkestrið, sum nú hevur ca. 20 limir úr øllum landinum – har eru bæði børn, ung og vaksin, sum spæla klarinet – hevur, síðan eina spaka byrjan í 2001, luttikið í nógvum ymiskum tiltøkum bæði í Føroyum og í øðrum londum.

Seinasta stóra tiltaki var í juli í ár. Tá var orkestrið á 10-daga langari uttanlandsferð til Álandsoyggjarnar, har tað millum annað spældi saman við rútmubólkinum, sum tey vanliga spæla saman við á Alandia Jazz Festival. Luttakararnir høvdu á festivalinum høvi til at hoyra tónleikarar á høgum internationalum støði og ógloymandi var eisini at síggja tað vakra oyggjalandið í fínasta summarveðri.

Um onkur burturgoymdur klarinetspælari er á Føroyalandi, sum kundi hugsa sær at spælt við í orkestrinum, kann viðkomandi venda sær til orkesturleiðaran Peder Riis-Jensen á tlf. 318454.

Á skránni tann 8. des. er klassiskur kirkjutónleikur af Bach og Bruckner, skotskur og walisiskur fólkatónleikur, operatónleikur av Gluck og sjálvandi vælkend og hugnalig jólaløg.

### Klarinett jól í Miðlahúsinum

Klarinett jól í Miðlahúsinum í Vágsbotni, leygardagin tann 15. desembur kl. 15 – 18.

Klarinettir úr øllum landinum spæla jólatónleik. Væleydnaða tiltakið fra desember 2006 verður endurtikið við hesari jóla hugnaløtu í Miðlahúsinum. Næmingar úr Føroya Musikkskúla luttaka. Stór og smá spæla jólatónleik og annað gott bæði sum solistar og í stórum og smáum bólkum.

Føroya Klarinettorkestur skipar fyri tiltakinum og eisini at okkurt gott og søtt fæst til matna henda dagin.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Nýtt virki og nýggjur samleiki



*Stjórarnir í lýsingarfyritøkuni Christian Nagata og Poul Clementsen í nýumbygdu hølunum í gamla snikkaravirkinum í J. Paturssonargøtu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í dag verður móttøka í liðugt umbygda virkisbygninginum í J. Paturssonargøtu (gamla Snikkaravirkinum í Grønlandi). Tað eru lýsingarfyriøkurnar Team 85 og Reproz, ið nú leggja saman sum eitt nýtt virki. Nýggja fyritøkan nú er partur av Nema-samtakinum.

Millum kl. 15 og 17 er móttøka í nýggju hølunum, har viðskiftafólk og onnur áhugað hava høvi at síggja nýggju hølini.

Umframt tónleik og okkurt leskiligt verður høvið eisini nýtt til at avdúka nýggja samleikan hjá fyritøkuni.

Nýggja fyritøkan fer at virka innan økini: Snið, lýsingar, samskifti, web- og internet loysnir, exposition (skipa fyri messum) og inog outdoor miðlar. Samanlagda fyritøkan verður tann størsta av sínum slagi í Føroyum.

Stjórar í nýggju fyritøkuni eru Christian Nagata og Poul Clementsen.

# Bók um 235 fiskar

Í dag kemur út nýggj bók við heitinum „Fiskar undir Føroyum".

Rógvi Mouritsen hevur skrivað bókina, sum Føroya Skúlabókagrunnur og Fiskirannsóknarstovan saman geva út.

Á fyrsta sinni kemur út upprunaføroysk bók um allan tann fisk, ið er skrásettur at liva undir Føroyum. Í hesum slóðbrótandi verki hevur Rógvi Mouritsen sum fiskimaður og biolog-assistentur á Fiskirannsóknarstovuni savnað okkara vitan um fiskasløg í føroyskum sjóøki. Tilsamans 235 fiskasløg eru skipað í hóp, ætt og slekt í nýggju bókini Fiskar undir Føroyum, sum Føroya Skúlabókagrunnur og Fiskirannsóknarstovan geva út.



*Rógvi Mouritsen við nýggju bók síni »Fiskar«*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Leingi hevur tørvur verið á eini fiskabók. Gamaní eru bøkur um fisk, veiðu og fiskasløg komnar fyrr, men aldri áður er ein upprunaføroysk fiskabók givin út. Nú er hon so her, Fiskar undir Føroyum, við tekningum hjá Astrid Andreasen og Bente Olesen Nyström, og skitsutekningum hjá Rolf Mouritsen.

Í tey stívliga 30 árini, Rógvi Mouritsen hevur verið biolog-assistentur á Fiskirannsóknarstovuni, hevur hann verið við í fiskikanningum undir Føroyum og aðrastaðni í Atlantshavinum.

“Eg havi nakað av snellu-, ymsum línu- og garnaroyndum, men serliga við troli á stórt sæð øllum leiðum við Føroyar. Haðani havi eg nógvar av mínum royndum og vitan um fisk, men eisini frá lesnaði, og frá fiskimonnum, sum eg var saman við,” sigur Rógvi Mouritsen, nú bók hansara Fiskar undir Føroyum kemur út.

Móttøka verður á Fiskirannsóknarstovuni 15:00, har bókin verður løgd fram og høvi verður at keypa hana fyri serprís.